## Juventus nýggjan venjara

Leingi hevði verið gitt, at dagarnir hjá Ciro Ferrera sum Juventus-venjari skjótt fóru at vera taldir, og hóskvøldið hendi tað so. Nýggjur venjari verður Alberto Zaccheroni, sum longu fríggjadagin stjórnaði venjingini hjá italska stórfelagnum. Hóskvøldið tapti Juventus 1-2 fyri Inter, og av tí at hetta var fimta tapið í seks teimum síðstu dystunum, varð tolið hjá Juventus-leiðsluni uppi.



## Eiður Smári aftur í London

Íslendski landsliðsspælarin, Eiður Smári Guðjohnsen, sum frá 2000 til 2006 spældi við Chelsea, er nú aftur í London og Premier League. Hesa ferð tó sum spælari fyri eitt av hinum feløgunum í London, Tottehham Hotspur, sum restina av kappingarárinum hevur leigað hann fra franska felagnum, Monaco. Eiður Smári hevur spælt í Monaco síðani í summar, men undan tí var hann í FC Barcelona í trý ár.




Fagnaðurin var øgiligur, tá Ísland enn einaferð hevði staðfest sítt navn í altjóða hondbóltsoddinum

## Ísland hevur eina bjarta framtíð

**Hondbóltsserfrøðingurin hjá Miðlahúsinum heldur, at Ìsland eisini verður eitt lið ein kann rokna við í framtíðini. Svein Rógvi Nielsen Ljósstein væntar tó, at Frakland fer at verða tann stóri valdsfaktorurin, ið hvussu er fram til OL-endaspælið í 2012**

Framtíðin hjá Íslandi á altjóða hondbóltspallinum sær bjørt út. Hondbóltsserfrøðingurin hjá Miðlahúsinum, Svein Rógvi Nielsen er ivaleysur í sínari meting. – Tað er ikki rætt at blíva við at tosa um íslendsku avrikini, sum brøgd. Teir hava eitt framúrskarandi lið, sum hevur prógvað, at olympisku silvurheiðursmerkini í 2008 ikki bara var hepnið, og ein einstøk hending. Liðið hevur nógvar góðar spælarar, eisini ungar spælarar, sum fara at halda Ìsland í fremstu røð í landsliðshondbólti, slær Svein Rógvi Nielsen Ljósstein fast.

### Dominera fram til 2012

Sjálvt um Svein Rógvi spáar íslendska landsliðnum eina spennandi framtíð til komandi HM, EM og OL-endaspøl, so er hann ikki í iva um, at Frakland verður tann stóri valdsfaktorurin í altjóða manshondbólti fram til 2012. – Frakland hevur teir bestu spælarnar ein kann hugsa sær yvir alt feltið. Í byrjanini av EM-kappingini gjørdu teir ikki meir enn neyðugt, men tá tað veruliga galt, tá vístu teir sína styrki. Liðið hevur eina ótrúliga stóra trúgv uppá egnar førleikar, eg trúgvi ikki, at tað franska liðið hevur orðið "at tapa" í sínari orðabók, staðfestir Svein Rógvi Nielsen Ljósstein.

heri

## Í sland-Kroatia 29-26 (12-12):

# Enn ein hond-bóltssøgn

**Íslendsku "strákarnir" skrivaðu sunnudagin enn eina hondbóltssøgn, tá teir fyri aðru ferð innan hálvtannað ár vunnu eitt heiðursmerki**




Heri Simonsen

Kapparnir í íslendsku søgnunum frá víkingaøld fáa nú skarpan gang. Ìslendska hondbóltslandsliðið, sum íslendski almenningurin so kærliga nevnir "strákarnir" staðfestu enn einaferð sína støðu í íslendskari søgu leygardagin. Ìsland hevði ein sannan uppvísning í fyrra hálvleiki í bronsudystinum ímóti Póllandi. Teir vóru á odda heili 18-10 í steðginum. Alt mundi kortini rapað í seinna hálvleiki. Pólland fekk bóltarnar inn, og Ìsland fekk bara trý mál tað fyrsta korterið av seinna hálvleiki. Pólski málverjin, Slawomir Szmal tók næstan allar royndirnar, sum komu ímóti pólska málinum.

### Íslendski málverjin bjargaði væl

Men so bjargaði íslendski málverjin, Hreiðar Guðmundsson frá hond, og hann átti sín stóra lut í, at Ìsland tryggjaði sær bronsu. Tað var annars sami Hreiðar Guðmundsson, sum gleið ímóti Eysturríki, og var sekur í, at Eysturríki fekk javnað. Tá Guðjón Valur Sigurðsson skoraði til 29-26 vildi íslendski fagnaðurin ongan enda taka. Talan er um annað heiðursmerki íslendingar vinna í einum endaspæli. Tað fyrra heiðursmerki var OL-silvur í 2008. Aftaná nógvu neiligu umtaluna Ìsland hevur fingið seinasta hálvtannað árið, orsaka av Icesave-málinum og búskaparliga skrædlinum, so kom tað á eitt ógvuliga turt stað at vinna EM-bronsu. Íslendski forsetin, Òlafur Ragnar Grímsson var staddur til bronsudystin í Wiener Stadthalle, og hann skein sum ein sól, tá bronsan var tryggjað. Henda hondbóltssøgnin hevur veruliga lyft íslendsku fólkasálina.

### EM-endaspælið 2010

| | | |
|---|---|---|
| **Millumbólkur 1** | | |
| 25/01 | Kroatia-Ísland | 26-26 |
| 25/01 | Noreg-Eysturríki | 30-27 |
| 25/01 | Danmark-Russland | 34-28 |
| 26/01 | Russland-Ísland | 30-38 |
| 26/01 | Kroatia-Eysturríki | 26-23 |
| 26/01 | Noreg-Danmark | 23-24 |
| 28/01 | Noreg-Ísland | 34-35 |
| 28/01 | Russland-Eysturríki | 30-31 |
| 28/01 | Kroatia-Danmark | 27-23 |
| **Millumbólkur 2** | | |
| 24/01 | Týskland-Frakland | 24-22 |
| 24/01 | Pólland-Spania | 32-26 |
| 24/01 | Slovenia-Kekkia | 35-37 |
| 26/01 | Slovenia-Frakland | 28-37 |
| 26/01 | Týskland-Spania | 20-25 |
| 26/01 | Pólland-Kekkia | 35-34 |
| 28/01 | Týskland-Kekkia | 26-26 |
| 28/01 | Slovenia-Spania | 32-40 |
| 28/01 | Pólland-Frakland | 24-29 |
| **Dystur um fimtaplássið** | | |
| 30/01 | Danmark-Spania | 34-27 |
| **Hálvfinalur** | | |
| 30/01 | Ísland-Frakland | 28-36 |
| 30/01 | Kroatia-Pólland | 24-21 |
| **Bronsudystur** | | |
| 31/01 | Pólland-Ísland | 26-29 |
| **Finala** | | |
| 31/01 | Kroatia-Frakland | 21-25 |